# HEILSANIR

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á okkara gullbrúðleypsdegi tann 11. august 2003 gleddu okkum við gávum, blómum, fjarritum og heilsanum annars.
**Hjørdis og Edvard Vilhelmsen**

Vit ynskja at takka øllum, sum gleddu okkum við fjarritum, gávum og á annan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara tann 2. juli 2003 so góðan og minnisríkan.
**Gurið og Brandur**

**Góða Jona**
Hjartaliga til lukku við føðingardegnum.
**Kærar heilsanir omma og abbi**

**For ólukkan, Petur Henry Mohr**
Nú er bara eitt ár eftir til pipari. Tak teg saman.

**Fitta Suffía frella**
Trúi at tú ræddist indianarar. Hjartaliga tillukku og vónandi fær tú ein góðan dag í dag og eisini í morgin ha, ha.
**Ynskja grannarnir - Jógvan Pauli**

**Góða Jona**
Hjartaliga til lukku við føðingardegnum.
**Kærar heilsanir langomma og langabbi**

**Góða elskaða Maria**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Alt tað besta í framtíðini. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**

**Góði elskaði Árni**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 29. aug.
**Ynskja Fríða, Eva, mamma og babba**

**Góða Barbara**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum.
**Mamma og babba**

**Góða suffía**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Tú ver so fin í Grønlandi.
**Heilsan heiðomma og heiðabbi**

Hendan mariuhønan verður 4 ár 31. aug. Tillukku. Trøllini Millum Gilja eru soooog góð við teg.
**Heilsan Eyðvør og Jørgin**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Samkoman Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti og tilbiðjunarmøti kl. 12. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum bæði møtini.
**Úti á Fløtum**
Mánakvøldið kl. 20 Alfa-Beta skeiðið og týskvøldið kl. 20 verður undirvíst um Opinberingina bæði kvøldini við Jógvan Z.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, Gunnar Nielsen talar.
Sunnudagsskúli er kl. 12.15.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabibliutími og bíbliugransking. Evni Jesu tænasta í Halgidóminum. Kl. 11 Gudstænasta, Sven Hagen Jensen.

**Aglow, Tórshavn**
Temadagur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygardagin 20. sept. kl. 10. Evni: Hin særda familjan. Alkoholtrupulleikar, manglandi sjálvsvirði hjá kvinnuni/barninum. Hvussu koma vit viðari? Kostnaður 120,- kr., døgurði á Sjómansheiminum íroknaður. Tilmelding á tlf. 313413 í seinasta lagi mikudagin 17. sept. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 11 Útifundur við Handilskjarnan um viðrar. Sunnudagin kl. 11 Møti, Palle Petersen talar. Eingin sunnudagsskúli men Familjumøti kl. 17, øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótafundir.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til kl. 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Tú ert vælkomin at koma við bønarevnum (skrivliga) ið verða lødd frammanfyri tað heilaga Sakramentið.
***»Vér her og vak við mær. Vak og bið!«***

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Frants Jensen.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 verður filmskvøld har filmurin »Omega Code 2: Megiddo« verður sýndur á stórskiggja. Eisini verður kaffi. Aldursmarkið er 15 ár.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Jenis av Rana og Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Felagið Agape**
skipar fyri almennum fundi í KFUK í Havn leygarkvøldið kl. 19.30. Evni: »Tvístøður, hvussu loysa ella liva við teimum«, um at arbeiða við tvístøðum, sum koma upp í gerandisdegnum t.d. heima, í meinigheitini á arbeiðsplássinum. Høvi verður at geva eina gávu til Agape.

**Missiónshúsið,Vestmanna**
Sunnudagink l. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti.

**Meinigheitshúsið í Sandavági**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við John Myllhamar. Evnið: Er ivi í andsøgn við trúgv.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Dávid Bech og kl. 19 við luttøku frá Getsemane í Klaksvík.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Mikukvøldið kl. 20 Felags húsbólkamøti.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj, barnamøti kl. 11. Sunnukvøldið kl. 19. Møti við Samuel Dunya frá Ghana. Vælkominí Kelduna.
www.keldan.fo

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnaløta fyri ung.
Sunnumorgunin kl. 11 Morgunmøti (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Bodil Simonsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti á Soli Deo Gloria kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Ólavur Johannesen, kl. 21 Ungdómsmøti.
Mánakvøldið kl. 20 Sjómanskvinnuringurin. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ Marnu og Frants Petersen, Jónhilda og Guðlak syngja.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Marnu og Frants Petersen, Jónhilda og Guðlak syngja. Bøn- og lovsangur er 1/2 tíma áðrenn møti.
Mánadagin byrjar Barnaarbeiðið aftur. Børnini frá 1.-5. flokk møta kl. 17.
Týskvøldið byrjar Ungdómsarbeiðið, 6. flokkur og eldri møta kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Símin Jacobsen. Einki kvøldmøti vegna møti í Samljóð. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnukvøldið 31. aug. kl. 18 tala og syngja Teir fýra av Argjum, øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21.30 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Albert og Kammu Johannesen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Terja Nielsen og Mourits Viderø, Mourits syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardag kl. 20 Bøn og lovsangur.
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúlin byrjar aftur. Møti kl. 18, major Kai Clausen úr Noregi talar. Øll eru vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti kl. 18 Møti, øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 21 Bønarmøti.
Frá kl. 21-23 verður Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 25. august*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv. Myndaveving á loftinum.
**Skulu vit fara ein túr til Hetlands?**
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 26. august*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Útoyggjaprát
*Mikudagin 27. august*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 28. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 29. august*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 31. august verður gongutúrur í Sjeyndir. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Tungur og langur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Dagtilhaldið í Vági**
byrjar aftur 2. september kl. 15.00-18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00 Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfriir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontið er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.


## Modelbátur

1.30 m., við motori, fjarstýring og ljós, til sølu. Prísuppskot 12.000 kr.

**Tlf. 318482**



Tekniski Skúlin Klaksvík

## Elektrikkari

Skúlin sóknast við hesum eftir einum elektrikkara ella el-installatøri til viðlíkahald, umsjón o.a. á Eldeildini.

Í serligum føri kann roknast við undirvísing.

Arbeiðið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Handverkarafelag og Fíggjarmálaráðið. Undirvísing verður lønt millum Føroya Tekniska Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Tann, ið settur verður, skal vænta at byrja skjótast tilber.

Umsókn við prógvum og viðmælum skulu vera inni, áðrenn 10. september 2003. Eru spurningar, so ring til Eyolv Jensen, deildaraleiðara ella Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
700 Klaksvík